AGANEVNDIN

KÆRA 08/2008

| *FSF skrivstovan upplýsir Aganevndini:* | |
|---|---|
| **Málsheitið: Kæra frá VB/SUMBA um, at HB hevur brúkt leikara í 1. deild menn, uttan at leikarin hevur sitið yvir í hægri deild** | |
| Deild: 1. deild menn | Kapping: Landskapping |
| Brot framt: 10. mai 2008 | Kæra innkomin: 14. mai 2008 |
| Kærugjald goldið: Ja | Kærufreist hildin: Ja |
| Partshoyring við 5 daga freist: Ja | Starvsnevndin biðin um ummæli: Ja |
| | Áheitan um munnliga viðgerð: Nei |

# AGANEVNDIN

## 1. Kærupástandir, partshoyringarsvar og møguligar viðmerkingar frá Starvsnevnd FSF's

**VB/SUMBA førir fram,** at

- leikarin hjá HB, Hendrik Rubeksen, spældi við móti VB/SUMBA, 2. deild menn leygardagin 10. mai, hóast sami leikari týsdagin 6. mai spældi dyst í Formulaliðnum hjá HB ímóti Víkingi og sostatt ikki hevur sitið yvir dyst í hægri deild, áðrenn luttøku í lægri deild

**HB førir fram,** at

- formaðurin í Kappingarnevndini uppá munnligan fyrispurning hevði upplýst HB, at sami leikari ikki kann spæla fleiri dystir í lægri og hægri deild, um talan er um sama leikumfar
- dysturin í Formuladeildini týsdagin 6. mai, sum Hendrik Rubeksen leikti, var partur av 6. leikumfari, sum varð spælt vikuskiftið frammanundan, og tí kann leikarin spæla í 1. deild leygardag 10. mai vikuskiftið eftir, vísandi til, at Fomulaliðið hjá HB spældi 6. mai (t.e. 2. Hvítusunnudag)

**Starvsnevnd FSF's** hevði ongar viðmerkingar til málið, annað enn, at mælt varð til, at formaðurin í Kappingarnevndini fekk høvi at koma við frágreiðing til málið, eftirsum HB ofta í síni frágreiðing vísir til formannin í Kappingarnevndini. Aganevndin metir ikki at neyðugt er at biðja formannin í Kappingarnevndini um frágreiðing, tí at tað, sum formaðurin er endurgivin fyri at hava sagt, er generelt og snýr seg um rættarreglurnar viðvíkjandi brúk av sama leikara í ymiskum deildum í sama leikumfari.

## 2. Heimildir hjá Aganevndini at viðgera málið

Sambært grein 2, sbr. grein 5 litra d kann Aganevndin viðgera mál um møgulig brot á lógarverk FSF's.

## 3. Fakta í málinum

Sambært dómaraseðlunum leikti Hendrik Rubeksen dyst við formulaliðnum hjá HB 6. mai og við 1. deildarliðnum hjá HB 10. mai.

## 4. Lógarverkið

Aganevndin staðfestir, at høvuðsreglan í grein 8 í kappingarreglunum ásetur í stk. 1 at: "Leikari, sum hevur luttikið í landskappingini í eini deild, kann ikki luttaka í landskappingardysti í eini lægri deild, uttan at felag hansara í millumbilinum ella sama dag, hevur leikt landskappingar-dyst, sum hesin ikki luttók í, í hægru deildini, hóast viðkomandi leikari lógliga kundi luttaka. Tá felag leikar í fleiri deildum, roknast hægsta deildin at hava leikt fyrst."

Eisini ásetur grein 8, stk. 7 at "Leygardagur og sunnudagur verða roknaðir sum ein leikdagur."

## 5. Staðfestingar, metingar, o.t.

Aðalspurningurin í hesum máli er, hvørt leikarin hjá HB, Hendrik Rubeksen, kann metast at hava

sitið yvir ein dyst í hægri deildini, t.e. Formuladeildini, eftir at leikarin 6. mai spældi dyst fyri Formulaliðið hjá HB og 10. mai spældi dyst á 1. deildarliðnum hjá HB.

Sambært grein 8 í Kappingarreglunum fyri fótbólt eru trinnar treytir fyri, nær leikari, sum hevur leikt fyri hægri deild, lógliga kann leika fyri lægri deild:

a) eitt ávíst tíðarskeið skal vera runnið, sbr. "í millumbilinum ella sama dag" og
b) dystur skal verða leiktur í hægri deildini, sum sami leikari lógliga kundi luttikið í og
c) talan skal verða um landskappingardyst

Staðfestast kann, at Formulaliðið hjá HB ikki leikti annan landskappingardyst í tíðarskeiðinum 6. mai til 10. mai. Hinvegin leikti Formulaliðið hjá HB hálvfinalu í Løgmanssteypakappingini 12. mai. Næsti vanligi landskappingardystur hjá Formulaliðnum hjá HB var eftir skránni ásettur til 18. mai. Hetta merkir, at sambært leikskránni vóru 12 dagar ímillum landskappingardystirnar hjá Formulaliðnum hjá HB í tíðarskeiðinum 6. mai til 18. mai. Eftirsum grein 8 í Kappingarreglunum orðarrætt setur sum treyt, at talan skal verða um landskappingardyst, kann tað staðfestast, at nevndi leikari ikki hevur sitið yvir landskappingardyst í Formuladeildini, áðrenn hann aftur luttók í dysti fyri HB 1. deild menn.

**6. Niðurstøða**

Tað er brot á grein 8, stk. stk. 1 at nevndi leikari spældi dyst í 1. deild menn fyri HB hin 10. mai, við tað at sami leikari frammanundan hin 6. mai leikti dyst fyri Formulaliðið hjá HB, uttan at Formulaliðið hjá HB í millumbilinum hevur leikt annan landskappingardyst, sum viðkomandi leikari kundi sita yvir.

**7. Úrskurður**

Grein 8 í Aganevndarreglugerð FSF's heimilar Aganevndini at geva feløgum og persónum sekt fyri brot á lógarverk FSF's. Brúk av ólógligum leikarum er álvarsamt brot á lógarverk FSF's og ta skipan, ið er gjørd fyri brúk av spælarum.

Fordømi eru um, at brúk av ólógligum leikarum er sektað við, at felagið verður dømt at tapa dystin. Aganevndin metir, at síggjast kann ikki burtur frá slíkum fordømum.

Við heimild í grein 8 í Agareglugerðini verður HB, 1. deild menn dømt **at tapa** dystin móti VB/SUMBA hin 10. mai fyri brúk av ólógligan leikara við málmuninum 0-0, sbr. grein 40 í Kappingarreglum FSF's.

**8. Upplýsing um kærumøguleika og freistir.**

Upplýst verður, at sambært grein 12 í Agareglugerðini kann avgerðin um, at HB 1. deild menn skal tapa dystin, kærast til Yvirkærunevndina. Kærast skal innan 5 dagar eftir at úrskurðurin er móttikin.

**9. Staður, dagfesting og undirskrift Aganevndarinnar:**

**Tórshavn 29 / 05 - 2008**

Anni á Hædd

Anni á Hædd, formaður